

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 04 - 2012

# Funnu meiri gass á Zidane-leiðini

Týska oljufelagið RWE Dea Norge hevur funnið meiri gass í Zidane 1-brunninum og fyrireikar seg nú til sína fyrstu sjálvstøðugu framleiðslu á norskum øki. Fyribils verður mett, at millum fýra og 13 milliardir rúmmetrar av gassi eru á Zidane leiðini. Zidane 2-brunnurin er knappar tveir fjórðingar frá Zidane 1-brunninum og einar átta fjórðingar í útnyrðing úr Heidrun-leiðini. Tað er pallurin West Alpha (myndin), sum hevur borað brunnin. Ralf to Baben hjá RWE Dea sigur við Aftenbladet, at við at menna Zidane-leiðina fær felagið sína fyrstu sjálvstøðugu framleiðslu á norskum øki, og harafturat hevur felagið stórar ætlanir um at menna framleiðsluna í komandi árum, sigur hann. RWE Dea Norge er operatørur á Zidane-leiðini við 40 prosentum av loyvinum. Samstarvsfeløgini eru Edison International, Maersk Oil og OMV Norge við 20 prosentum í part.